
USA, sendi hann B-52 bumbuflogfør í hópatali inn yvir Norður Viet Nam. Hesi flogfør flúgva sera høgt, so tær russisku luftverjurakettirnar hjá norðurvietnamesiska herinum rukku teimum ikki. Teir fingu kortini skotið so mikið nógv flogfør niður, at hetta førdi til at táverandi amerikanski uttanríkisráðharrin Henry Kissinger og norðurvietnamesiski starvsbróðir hansara Le Duc Tho tann 27. januar 1973 skrivaðu undir eina friðaravtalu í Paris.



Hoang Đinh Quang

" Teir bundu tvær rakettir saman, so tær rukku hægri," sigur Quang errin. " Russar vóru sera bilsnir, tí tað høvdu teir ikki hugsað um."

Mistu eygu ella høvd

Allir ungir menn vildu sleppa í herin fyri at berjast móti amerikumonnum.

Tað vildi Quang eisini, men tað hevði hann ikki loyvi til, av tí at tveir eldri bróður vóru í herinum frammanundan. Lógin loyvdi í mesta lagi tveimum monnum úr hvørjari familju at gerast hermenn. Í staðin fór Quang saman við nógvum øðrum ungum monnum, ið vóru í somu støðu, í sjálvboðið arbeiði fyri herin.

Hetta var á heystið í 1973, og hann var tá 16 ára gamal. Hansara arbeiði var at hjálpa við at gera ein veg úr Norður Vietnam til Laos. Arbeiðið var torført, tí vegurin skuldi upp um fjøllini á markinum millum londini. Á fjøllunum var hitin ofta øgiligur, og umstøðurnar at búleikast vóru vánaligar. Nógvir ungir menn doyðu av gulfepuri undir arbeiðnum í fjøllunum.

" Vit vistu, at fóru vit í herin ella í sjálvboðið arbeiði fyri herin, skuldu vit ikki rokna við at koma heimaftur á lívi. At øll gjørdu sær hetta greitt, var uttan iva orsøkin til at vit vunnu kríggið," sigur Quang.

Eftir at vera komnir um markið til Laos vórðu arbeiðsmenninir, ið bert høvdu vápn at verja seg sjálvar við, ofta álopnir av hálvhernaðarligum bólkum úr Laos, sum vórðu stuðlaðir av amerikanska herinum. Hesir bólkar fingu pening frá amerikumonnum fyri hvørji tvey eygu, teir tóku úr norðurvietnamesarum ella teirra viðhaldsfólki í Laos.

" Tað var verri í Cambodia. Har mistu teir høvdið," sigur Quang, og ristir við høvdinum fyri at vísa á, at tað er har enn.

Ein onnur hóttan vóru tær amerikansku bumburnar, ið vórðu tveittar fyri at oyðileggja vegin, og tey kemisku evnini, sum tey amerikansku flogførini sproytaðu yvir skógin fyri at drepa trøini, og soleiðis betur kunna halda eyga við teimum norðurvietnamesisku herdeildunum. Quang fekk varandi mein í eyguni av evninum napalm, ið varð tveitt yvir skógin. Eftir at hava brent allan gróður verður restin av evninum liggjandi á jørðini, og kann síðan spreingjast av eini glóðandi sigarett ella einum neista.

Quang var í Laos og umvældi vegin fram til 1977. Annað hvørt ár fekk hann loyvi at fara heim at vitja familjuna.

" Okkara familja hevði eydnuna við sær. Vit vóru tríggir bróður, sum luttóku í krígnum, og vit eru allir á lívið í dag ," sigur Quang at enda.

Hvørt kvøld, skjótt fjórðingsøld eftir, at kríggið varð liðugt, kanst tú í eini tríggjar minuttir langari sending siggja fólk spyrja um nakar hevur sæð ein av teirra kæru, sum ikki kom heim aftur eftir kríggið.


KROSSORÐAGÁTA

KROSSORÐAGÁTAN NR. 129

Tíverri vóru eingi tøl til loysunarorðið sett í krossorðagátuna nr. 129, sum var í blaðnum leygardagin 13. sept.

Krossorðagátan verður tí aftur í blaðnum í dag, og freistin at senda inn verður komandi hósdag.

Tey, sum *hava* sent alla krossorðagátuna inn, nýtast ikki at senda inn av nýggjum, men tey sum eru setst aftur at senda inn, kunnu senda lepan úr blaði nr. 174, 13. sept. inn.



Málningaframsýning hjá Gunnar Kr. Jónasson í Norðurlandahúsinum



Leygardagin 20. september 1997 kl. 16.00 letur upp málningaframsýningin hjá Gunnar Kr. Jónasson, úr Íslandi.

Gunnar er føddur í Akureyri. Hann er útbúgvin sum jarnsmiður, hevur gingið á Akureyrar listaskúla og hevur verið til nógv skeið, innan list - bæði heima í Íslandi og í útlondum.

Hann hevur arbeitt sum jarnsmiður, arbeitt á reklamustovum og eigur nú størsta partin av Still reklamustovuni í Akureyri.

Gunnar Kr. Jónasson hevur havt framsýningar í Gallery Ping, í Akureyri 1993, í ASÍ listaskálanum í Reykjavík 1994 og 1997, hevur verið við á eini framsýning á Seyðisfjørðinum í september 1995, í sambandi við, at Seyðirfjørðurin fylti 100 ár, hevur havt framsýning í Hrísey kommunu í juli 1997, og hevur verið við í framsýningini »Uppskera« í Kjarnaskógi, Akureyri 1997.

Hann hevur eisini verið á nógvum námsferðum umsastaðni í Europa.

Hann verður sjálvur til staðar, tá ið framsýningin letur upp leygardagin kl. 16.00.